Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli:

# Dugnaskaparroynd í sigling



Fríggjadagin 13. apríl 2007 hevði Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli próvtøku í fakinum "Dugnaskaparroynd í sigling", har 17 næmingar fingu prógv. Undirvísingin var á Vinnuháskúlanum (Føroya Sjómansskúla). Annars verða aðrar próvtøkur hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli lidnar í juni mánað. Prógvið gevur rætt til at føra skip til og við 99 bruttotons í heimasjógvi (200 fjórðingar).

Hesi tóku prógv í fakinum "Dugnaskaparroynd í sigling". Fremra rað f.v.: Jákup Bærentsen, Sund, Hermann Dam, Argir, Annfinn Hansen, Tórshavn, Jógvan Fróði Hansen, Leirvík, Eyðun Hjaltalin Vestergaard, Tórshavn, Torfinn Højgaard, Argir, Elin Jensen, Tórshavn, Marius Jensen, Tórshavn, og Regin Joensen, Toftir.

Aftara rað f.v.: Kristian Poulsen, lærari, Christoffer Lützen, Tórshavn, Finnur Lützen, Tórshavn, Johannes Mortensen, Tórshavn, Sæbjørn B. Nielsen, Hoyvík, Ámundur Nolsøe, Nólsoy, Árni Sørensen, Argir, Karstin Wang, Kvívík, Torbjørn Viderø, Tórshavn, og Petur Hans Dahl, lærari

†

## Andlát og jarðarferðir

**Lítla Sóley Kastalag**, dóttir Gunnvá og Høgna Kastalag, andaðist á Landssjúkrahúsinum 21. mai, 8 mánaðar gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Marnar Dam**, ættaður av Norðskála, búsitandi í Oyndarfirði, andaðist í gjár 21. mai, 36 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

†

Lítla

**Sóley Kastalag**

dóttir Gunnvá og Høgna Kastalag

andaðist á Landssjúkrahúsinum 21. mai,
8 mánaðar gomul.

# Ítróttadagur fyri sinnisveik

**Fríggjadagin 15. juni verður fyri fyrstu ferð nakrantíð skipað fyri stórum ítróttatiltaki fyri sinnisveik. Tiltakið verður hildið á graslíkisvøllinum á Argjum**

TÍÐINDASKRIV

Fyri fyrstu ferð nakrantíð verður nú skipað fyri stórum ítróttatiltaki fyri sinnisveik.

Tað eru Stuðulstænastan, dagdeildin á Psykiatriska deplinum og Sambýlið í Eysturstræti, ið hava tikið stig til tiltakið, sum verður hildið á graslíkisvøllinum á Argjum fríggjadagin 15.juni frá klokkan 9-16.

Ítróttatiltakið, fyri øll sinnisveik í landinum og teimum starvsfólkum, sum dagliga arbeiða við teimum, sprettir úr einum innanduratiltaki, ið hevur verið hildið seinastu tvey árini. Fyri at fáa enn fleiri við, verður nú ístaðin skipað fyri uttandurakappingum í fótbólti, boccia, rundbólti og kúluvarpi. Tað er ikki neyðugt at luttaka í kappingunum fyri at vera við – "fjepparar" eru eisini vælkomnir - men høvuðsendamálið við degnum er tó at økja áhugan hjá teimum luttakandi fyri rørslu og sunnum livimáta. Heiðursmerki verða latin vinnandi liðunum og einstaklingum.

Neyðugt er at boða frá luttøku frammanundan, og tað kann gerast á tlf. 354020, ella við senda ein teldupost til studulstaenastan@naerverk.fo áðrenn 31.mai. Tað kostar 100 krónur fyri hvønn at luttaka, og tá er morgunmatur, ein biti á døgurða og kaffi, te og køkur við í prísinum, umframt, at luttakararnir fáa eina t-skjúrtu sum prógv fyri luttøku í ár.

Stjórin í Nærverkinum, Mary í Garði, fer at bjóða vælkomin, og landsstýrismaðurin í Almanna og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, setur ítróttadagin.

Ætlanin er, at tiltakið skal verða afturvendandi.

Listaframsýning í Mentamálaráðnum:

# »Tá foreldur fara hvør til sítt «

Í sambandi við verkætlanina "Tú hevur rætt" hjá Barnabata letur listaframsýning upp í Mentamálaráðnum hósdagin 24. mai 2007, kl. 15.00.

Á framsýningini, ið ber heitið "Avskjed og gjensyn", sýna tveir norskir listamenn verk síni. Paul Meldal hevur saman við soni sínum Espen Solli skapt eina myndarøð, ið lýsir sambandið millum pápa og son, tá foreldur fara hvør til sítt. Úr hvør sínum sjónarhorni lýsa pápi



og sonur, hvussu teir hava upplivað tað.

Myndirnar vísa lívið, sum hevur verið merkt av "avskjed og gjensyn". Myndirnar hjá soninum Espen Solli snúgva seg um sambandið við bæði foreldrini, frá tí hann var barn, til hann í dag er vaksin. Myndirnar hjá pápanum, Paul Meldahl, lýsa sambandið millum hann og sonin.

Espen Solli tekur fotomyndir, og Paul Meldahl brúkar olju á lørift.

Í sambandi við framsýningina er serligt tilfar framleitt, ið snýr seg um støðuna, sum børn koma í, tá foreldur fara hvør til sítt. Tilfarið er í 3 ymiskum útgávum – eitt til børnini, eitt til foreldrini og eitt til tey, sum arbeiða við børnum s.s. lærarar, pedagogar osfr. Tilfarið verður at finna á www.eg.fo fríggjadagin 25. mai 2007.

Tá framsýningin letur upp fer Karin Brattaberg at greiða frá, hvussu og hví henda framsýning kom í lag. Búi Dam og Ása Vraa Olsen fara at framføra nøkur løg og greitt verður eisini frá nýggja tilfarinum, ið er framleitt.

Framsýningin, ið er almenn, er opin til 1. september 2007, og eru øll vælkomin.